


Island Spirit hevur nú onki at gera. Mynd: Island Offshore

# Island Offshore leggur enn eitt skip

**Jógvan Hugo Gardar**

02.11.2015 - 11:08

Oljan.fo

Island Offshore boðar í morgun frá atavgerð er tikin um at ROV-veitingarskipið Island Spirit verður lagt í Ulsteinvik í vetur. Skipið tekst serliga við undirvatnsátøk, og hesar uppgávurnar plaga at fækka vetrarhálvárið.

Stjóri í Island Offshore, Håvard Ulstein, sigur sambært Maritime, at roynt verður at flyta manningina yvir á onnur skip, men at tað ikki slepst undan koyra fólk heim. Vónin er at tey aftur kunnu vera til verka í 2016.

Við hesum eru seks av skipunum hjá Island Offshore uttan arbeiði.